**Serstøk byggisamtykt fyri summarhúsøkið norðanfyri Ljósá**
**Dagfest: 30.08.2022**

## Ætlan við samtyktini:

Ætlanin við hesi serstøku byggisamtyktini, er at loyva bygging av fríðtíðarhúsum, har fólk kunnu njóta friðin og vakra útsýni út í Sundalagið og norður í Flógvan. Tað er umráðandi fyri Eiðis kommunu at so mong sum gjørligt fáa part í hesum tilfeingið. Tí treytar kommunan sær rætt til, umframt niðanfyristandandi ásetingar, í hvørjum einstøkum føri at seta krøv til skap og staðseting av hvørjum einstøkum húsi, so tað er til minst møguligan ampa fyri grannar.

## Stødd, hædd, vídd, skap:

Grundøkini skulu vera í minsta lagi 200 m².
Mest loyvda hæddarvídd á húsum er 60 m².
Mest loyvda hædd á útvegum er 3 m til yvirgrind og 5,5 m til mønu.
Hall á tekju skal verða 38-43 stig.
Loyvt er at gera ein karnap, sum er í mesta lagið 1,5 m djúpur og 3,5 m langur.
Bert eitt fríðtíðarhús kann verða á hvørjum matrikli.
Umframt fríðtíðarhús er loyvt at byggja eitt úthús á í mesta lagið 5m². Úthús skulu í høvuðsheitum hava sama skap sum fríðtíðarhúsið, og kann verða í mesta lagið 2,5 m høg til mønu.
Hæddir verða máldar frá planeringshædd, sum verður ásett av byggivaldinum.

## Litur, tilfar, staðseting:

Hús skulu hava rektangulert skap og skulu standa á longs við hæddarkurvarnar.
Hús skulu hava mønureising við flagtekju.
Hús skulu vera soleiðis vorðin og skulu setast soleiðis í landslagið, at tey lýta sum minst.
Húsini skulu klæðast við timbri, og evt. málast við døkkum liti.

## Lendistillaging:

Verandi lendi kann tillagast við grótlagaum stuðlaveggi, sum er í mesta 1 m høgur. Er neyðugt at tillaga lendi meira enn hetta, skal tað gerast í fleiri stiðum við hóskiligum avstandi ímillum.
Uttanumøki skal vera væl frágingið.
Girðing kann setast upp, men skal ikki lýta økið og byggingina.

## Hátún og giringar:

Loyvt er at gera hátún á uml 15 m². Hátún skulu verða lendisføst.
Loyvt er at gera lívdargirðingar á hvørjum stykki, upp til 5 metrar til longdar, og upp til 1 m høgt.
Aðrar girðingar í samband við planting kunnu vera upp til ½ m í hædd, og samlaða longdin upp til 10 metur.
Tilfarið skal vera timbur ella grót.

## Byggiøkið:

Ta er bert loyvt at byggja í økinum sum sæst markera við grønum liti á kortinum til vinstru (Eisini hjálgat í størri stødd).



*Kort yvir byggiøkið (grønt)*

## Byggifráleikar:

Sí BK17.

## Atkoma:

Kommunan gerð onga atkomu til húsini.
Tað verður álagt hvørjum einstøkum húsaeigara at gera eina ætlan fyri gongusambandi frá parkeringsplássi til  til húsini. Ætlanin skal leggjast fyri kommununa til góðkenningar.
Eigarin ber sjálvur kostnaðin fyri at gera gøturnar og at viðlíkahalda tær.
So hvørt sum nýgg hús koma afturat, skulu nýggju húsaeigararnir hava rætt til at nýta verandi gøtur.

## Parkering:

Av tí at húsini standa langt frá koyrivegi, er einkið krav til parkeringspláss á matriklinum.
Hinvegin so skal hvør einstakur eigari, í samstarvi við kommununa og SEV, gera 2 parkeringspláss til hvørt húsi sum bygt verður, framvið vegnum oman til SEV verkið.
Eigarin hevur brúksrættin til annað av hesum plássunum. Hitt er til almenna nýtslu.
Eigarin ber sjálvur kostnaðin av at gera og viðlíkahalda bæði parkeringsplássini.

## Kloak:

Tað er eingin kommunal kloakleiðing í økinum. Tí skal hvør einstakur húsaeigari syrgja fyri at kloakleiðing (frá vesi/septiktanga) verður førd fjald, forsvarliga og lógliga út á sjógv.
Ætlan fyri hvussu hetta skal gerast, skal í hvørjum eistøkum føri leggjast fyri Eiðis Kommunu til góðkenningar. Eigarin ber sjálvur kostnaðin av hesum.

## El:

Tað er eingin elveiting í økinum. Tí skal hvør einstakur húsaeigari syrgja fyri síni egnu elveiting. Ætlan fyri hvussu hetta skal gerast, skal í hvørjum eistøkum føri leggjast fyri Eiðis Kommunu og SEV til góðkenningar. Eigarin ber sjálvur kostnaðin av hesum.

## Vatn:

Tað er eingin vatnveiting í økinum. Tí skal hvør einstakur húsaeigari syrgja fyri síni egnu vatnveiting. Ætlan fyri hvussu hetta skal gerast, skal í hvørjum eistøkum føri leggjast fyri Eiðis Kommunu til góðkenningar. Eigarin ber sjálvur kostnaðin av hesum.

## Hitaskipan:

Hitaskipan skal vera av slíkum slag, sum ikki er til ampa fyri grannarnar, í mun til óljóð og lukt.